*Útbúgvingarsamstarv Føroyar-Noreg:*

# Føroyskir næmingar til Noregs at læra oljuvinnu

Mikudagin 26 februar 1997 verða í Føroyum 2 samstarvsavtalur við útbúgvingarstovnar í Stavanger undirskrivaðar Teir norsku útbúgvingarstovnarnir eru ávíkavist Stavanger maritime videregående skole og Høgskolen í Stavanger Samband fekst við teir norsku uthugvingarstovnarnar, tá ið Føroya Oljuídnaður og ALS vóru á oljumessu í Stavanger á heysti 19Seinsatu96

Stavanger maritime videregående skole fer mikudagin 26 februar kl 9.30 á Maskinmeistaraskúlanum við Oyggjarvegin at undirskriva eina ætlanaravtalu við Tekniska Skúlan í Tórshavn. Tekniska Skúlan í Klaksvík, Føroya Sjómansskúla og Maskinmeistaraskúlan Endamálið við avtaluni er, at næmingarnir á teimum føroysku skúlunum kunnu fara á Stavanger maritime videregående skole og taka styttri ella longri skeið við atliti at oljuvinnuni við støði í teirra útbúgving úr Føroyum Miðað verður upp á longri sikt eisini ímóti, at møguleiki verður fyri at skifta um lærarar millum skúlarnar

Stavanger maritime videregående skole hevur síðani fyrst í sjeytiárunum ment serkunnleika innan ymiskt skeiðvirksemi við atliti at trálandavinnu, t.d. heldur skúlin skeið í boriteknikki. brunnteknikki og automatisering Við støði í hesum skeiðvirksemi er ætlanin eisini, at Stavanger maritime videregående skole fer at hjálpa við at upphyggja eitt skeiðvirksemi í Føroyum við atliti at oljuvinnuni.

Seinnapartin mikudagin 26 februar verður eisini avtala undirskrivað millum Høgskolen í Stavanger og Fróðskaparsetur Føroya, men meiri um hesa avtalu í einum øðrum tíðindaskrivi


# Føroyingar í útbúgving

Útbúgvingar fyri føroyingar á TietgenSkúlanum, TietgenSkolen Odense Business College

## STYTTRI FRAMHALDSLESTUR

**1 ár á handilsstudentaskúla**
Upptøkukrøv HF ella Studentaskúla

**Búskaparfrøði á marknaðarøkinum**
Útbúgving til búskaparfrøðing á marknaðarøkinum (markedsøkonom) 2 ára framhaldslestur innan marknaðarføring og altjóða sølu

**The Marked Economist Course**
2 ára útbúgving innan altjóða marknaðarbúskap Undirvisingin fer fram á enskum

**Datamatikaraútbúgving**
2½ ára edv-útbúgving í edv-umhvørvi.

**Útbúgving innan útflutning (eksporttekniker)**
– 4 ára útbúgving, har dentur verður lagdur á sølutøkni

*Lýsingarhefti og aðrir upplýsingar fáast við at venda sær til TietgenSkúlan*

**Íbúð til føroyingar í Odense**
Vit kunnu hjálpa til at útvega næmingabústað, um umsókn tín er okkum í hendi í seinasta lagi 1. mars 1997

*TietgenSkúlin, Odense Business College, er ein av landsins bestu vinnulívsskúlum við umleið 20 000 lesandi og skeiðluttakarum innan handilsútbúgvingar. Tær útbúgvingar, vit kunnu bjóða fram, eru lærlingaútbúgvingar, handilsstudentaútbúgvingar og framhaldslestur innan marknaðarføring/búskap og útbúgving til datamatikara og eksportteknikara TietgenSkúlin hevur eisini eina rúgvu av tilboðum innan skeiðvirksemi umframt kvøld- og frítíðarundirvísing. Á skúlanum arbeiða 520 starvsfólk, og skúlin hevur umleið 150 mill kr. í árligum umsetningi*

TIETGEN SKOLEN
ODENSE BUSINESS COLLEGE
Nonnebakken 9, DK-5000 Odense C, Danmark
Tlf +0 66 11 57 47
E.Mail·WWW tietgen dk


# Almenn skótagudstænasta

*Flestu skótalið kring landið skipa fyri skótagudstænastu hugsunardagin*

Hugsunardagurin, ið verður hátíðarhildin av skótum um allan heimin, til minnis um hjúnini Baden-Powell, ið bæði høvdu føðingardag henda dag 22. februar.

Í ár eru tað 140 ár síðan Baden-Powell varð borin í heim. Olave var 32 ár yngri

Um Ólavsøkumundið verða tað 90 ár síðan B P hevði ta fyrstu skótaleguna úti á Brownsea Island Ikki mundi hann gruna at hetta tiltak hann gjørdi fyri hesar 21 dreingirnar skuldi fáa so stóran týdning fyri børn og ung í tíðini sum kom.

Hugskotið til skótaarbeiðið, sum hann nevndi hetta frítíðaritrivið, fekk hann á Mafeking í Suðurafrika, har hann hevði brúkt unglingar til ørindadreingir sum hjálp hjá herinum, og við at útbúgva hermenn til bretska herin, har hann gjørdi tænastu sum heryvirmaður í meir enn 30 ár

Á enskum verður dagurin nevndur Thinking Day ella World Friendship Day, tí á hesum degi hugsa vit um stovnara og skótavinir okkara kring allan heimin

Ymiskt er hvussu dagurin verður hildin kring knøttin, men heima hjá okkum er siður at vit hugsunardagin fara í kirkju, og aftaná hava eina hugnaløtu saman

Gudstænastur verða í hesum støðum

Argja Kirkju kl 19.00, prestur Kjartan Mørkøre

Vestmanna Kirkju kl 17.00, prestur Uni Næs

Fuglafjarðar Kirkju kl 16.00, prestur Martin Restorff Jacobsen

Christianskirkjuni kl. 20.00, prestur Niels Pauli Danielsen.

Talvan gongur til frama fyri Skótahjálpina

Skótagudstænastan er eisini fyri almenninginum Øll eru vælkomin

# Eydnuhjól á Tvøroyri

Tað er ikki hvønn dag, at skipað verður fyri eydnuhjóli, men leygarkvøldið og sunnukvøldið 1 og 2 mars 1997 fáa tvøráfólk og aðrir suðuroyingar møguleikan at fara á eydnuhjól'

Tað er Tvøroyrar Bóltfelag, sum skipar fyri tiltakinum, sum verður leygarkvøldið frá kl. 19.00 og sunnudagin frá kl 16.00.

Tað verður nógv gott at vinna á eydnuhjólinum, og hava fyritøkur og einstaklingar kring oyggjarnar latið allar vinningarnar

Umframt eydnuhjól verður eisini lutaseðlasøla, har høvuðsvinningarnir verða ein uttanlandsferð til Noregs í summar fyri 2 og ein stórur modelbátur við motori, so børnini hava eisini nakað at vinna. Drigið verður móti endanum seinna kvøldið

Meðan eydnuhjólið og lutaseðlasølan fara fram, verður møguleiki at keypa kaffi/te, eplakøku ella okkurt annað úr kioskini.

Tvøroyrar Bóltfelag vónar, at fólk møta fjølment, tí peningurin, ið inn kemur, fer óskerdur til ungdómsarbeiði hjá felagnum.


Skorsteinssóparin
Søla og uppseting av
REINSILÚKUM
ROYKHETTUM
Tlf. 22459 - 86458

BILLUTIR
útvegast til
FLEST ALLAR
BILAR
Fa. BILLUTIR
Tlf. 21605
Fax. 21666